ítróttur

Nr. 116 • týsdagur • 24. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Kappróður



Leygardagin var triðja FM-stevnan á árinum hildin, tá kollfirðingar skipaðu fyri sundalagsstevnuni. Í blaðnum í morgin hava vit drúgva frásagnir frá øllum róðrunum á stevnuni.

# Todi bjargaði endaspurtinum



*FCK-venjarin helt, at landsliðssteðgurin kom væl við hjá FCK. Eitt nú tí hetta gav Toda frið at koma veruliga fyri seg, soleiðis at hann kundi verða ein av lyklaleikarunum, tá meistaraheitið skuldi fáast til høldar*

**Svenski FCK venjarin ásannaði, eftir at liðið hjá honum hevði vunnið DM, at tað hevði havt alstóran týdning fyri úrtøkuna í síðstu umførunum, at Todi Jónsson var komin fyri seg eftir skaða**

ÚITISETI MEISTARI
*Jóannes Hansen*

At tað hevur gingið nógv upp og niður hjá Toda Jónsson og FCK í vár hevur verið at sæð á úrslitunum og harvið støðutalvuni tað meta av várinum. Tá ið tað eftir vetrarsteðgin varð farið undir seinna partin av donsku landskappingini, var FCK so langt frammanfyri øll hini. Men munurin minkaði, og tá ið teir mikukvøldið í síðstu viku fóru út í Brøndby, vóru teir í FCK eitt stig aftanfyri teir gulu og bláu. FCK vann 1–0, og harvið høvdu teir sunnudagin sjálvir møguleikan at gera av, um teir skuldu vinna DM.

Tá ið FCK hevði vunnið 4–1 á AGF, og venjarin, Hans Backe, leit afturum bak fyri at taka saman um kappingarárið, ásannaði hann, at tað ikki altíð hevði sæð so bjart út í vár. Og hann fjaldi ikki yvir, hvør orsøkin var til, at tað nú uppundir endan aftur hevði gingið betri, eftir at tað leingi hevði sæð illa út:

– Vit fingu stórt gagn av, at landskappingin helt frí í tvær vikur orsaka av tveimum EM undankappingardystum. Todi Jónsson, Thomas Røll og Martin Albrechtsen vóru skaddir, og vit saknaðu teir nógv. At vit í tvær vikur í frið og náðum kundu venja, uttan at spælararnir noyddust at spæla strævnar landskappingardystir, kom sera væl við hjá okkum. Hesir lyklaspælararnir komu fyri seg, og tað var rættuliga avgerandi fyri, hvussu gongdin var í síðstu umførunum, segði FCK venjarin.

Harvið kann staðfestast, at venjarin og hinir í FCK leiðsluni hava bitið høvdið av sínum egnu ætlanum og reiðiliga tað. 13. januar fekk Todi at vita frá FCK leiðsluni, at teir ikki ætlaðu at hava hann á liðnum í vár. Men tá ið munurin aftur til Brøndby var tódnaður til tvey stig, var Todi grivin fram aftur. Hetta var 21. apríl, og 22. juni, tá ið FCK hevði vunnið DM fimm stig frammanfyri Brøndby, boygdi FCK venjarin seg so nógv, at hann gav Toda ikki so lítlan part av heiðrinum fyri góðu gongdina hesar seinastu vikurnar.

### Nóg gott álop

Tá ið gullkrónurnar vóru komnar um hálsin, og stóra steypið hevði ferðast millum kátu spælararnar, vildi pressan hava Hans Backe og nevndarformannin, Flemming Østergaard, sum altíð dugur at koma sær í miðdepulin, at siga, um FCK hevur ætlanir um at keypa nýggjar spælarar, áðrenn teir um fjúrtan dagar fara undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið.

FCK leiðslan sigur seg ikki hava ítøkiligar ætlanir um at keypa nýtt:

– Men tú skalt ongantíð siga ongantíð. Um okkurt felag bjóðar okkum 150 milliónir fyri onkran av spælarunum hjá okkum, so kunnu vit ikki gera annað enn taka av. Og tað fer so aftur at hava við sær, at tað verður neyðugt at finna ein avloysara. Men vit halda, at spælararnir, sum nú eru við til at manna liðið hjá okkum, eru væl fyri at umboða okkum í Europa Cup, sigur Flemming Østergaard.

Og Hans Backe hevur hetta at leggja afturat, tá ið tað snýr seg um álopið:

– Í vár hevur tað verið ein trupulleiki, at vit ikki hava megnað at skora upp á nóg nógvar av øllum málmøguleikunum, sum vit hava spælt okkum til. Men vit hava fýra góðar álopsspælarar. Teir eru Todi Jónsson, Zuma, Peter Møller og Jörgen Pettersson, og vit ætla okkum at endurvinna DM og standa okkum í Europa Cup við teimum í fremstu rød.



# Havnin átti hetta vikuskiftið

**Eftir floppið í Gundadali ímóti B36 er troystin hjá fótbóltshugaðu klaksvíkingunum í hesi vikuni, at teir eiga Toda Jónsson**

6. UMFAR SAMANUM
*Jóannes Hansen*

Fyrsti triðingurin av fótbóltslandskappingini 2003 er lagdur afturum. Í fínastu líkindunum vórðu fýra dystir spældir, og tað gekk, sum tað hevur gjørt í flestu av hinum umførunum. Útisigrarnir vóru fleiri enn heimasigrarnir, og ein dystur endaði við javnleiki. GÍ og Skála høvdu avgjørt sítt stríð fyri einum mánað síðani. Men longu í annaðkvøld verður GÍ í dystartali aftur frammanfyri hini. Tá skulu teir spæla á heimavølli ímóti EB/Streymi. Talan er um framskundaðan dyst í sjeynda umfari, tí GÍ leygardagin fer at spæla í Intertoto Cup.

GÍ verður mest kroyst, men eisini øll hini fara at hava hópin at síggja til næstu tvær vikurnar. Umfar í landskappingini verður á skránni í vikuskiftinum, mikukvøldið í næstu viku, aftur í vikuskiftinum og í miðviku, og so verður endin undan summarsteðginum í vikuskiftinum.

Tí kann tað vera, at okkurt um tríggjar vikur fer at venda niður, sum nú vendir upp. Men í løtuni er tað nógv, sum talar fyri, at tað fyri fyrstu ferð verður sama meistaralið tvey ár á rað. HBarnir tykjast avgjørt ikki at vera mettir. Sunnudagin vóru teir í Vági, har heimaliðið er í trongstøðu og leingi vísti, at teir eru fullgreiðir yvir sína støðu og ætlaðu at gera nakað við tað. Men teir megnaðu ikki at boyggja HB, sum fyri fyrstu ferð síðani 1991 fekk fult á Vágs eiði. Sigursmálið fingu teir í evstu løtu. Tað plagar at vera typiskt fyri oddalið, at tey fáa mál í síðstu minuttunum, og tað plagar ikki at vera tilvildin, sum ger tað av. At venjingarstøðan er góð og kanska betri, enn hon er hjá móststøðumonnunum, plagar at koma til sjóndar síðstu løtuna.

Úrslitini hjá kappingarneytunum hjá HB í toppinum lagaðu seg væl fyri eldra havnarfelagið, og so fingu teir eyka hjálp á Toftum. Sunnudagin skal HB spæla á Svangaskarði, og longu sunnudagin glapp botnurin úr B68 verjuni, tá ið Hans Fróði Hansen varð rikin av vøllinum. Harvið er greitt, at hann verður ikki við ímóti HB.



*- Fyrst og fremst má staðfestast, at B36 tykist vera sloppið burtur úr nagga0tódnini, sum teir vóru í fyrstu umførini. Í løtuni er stóri spurningurin, hvat ella um B36 fer at megna at gera nakað við HB*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### B36 funnið stevið

Klaksvíkingar hava skavað ikki so lítið at stigum saman, men avrikini hava ikki verið so sannførandi, at tey hava givið ábendingar um, at tað skuldi roknast við KÍ sum røttum oddaliði. Serliga á heimavølli hevur tað gingið striltið hjá KÍ. Undan vikuskiftinum høvdu teir vunnið tríggjar ferðir á útivølli. Men góðu gongdini á útivølli syrgdi B36 so rudduliga fyri at steðga í Gundadali.

KÍ varð avsmurt 7–1. Fyrst og fremst má staðfestast, at B36 tykist vera sloppið burtur úr naggatódnini, sum teir vóru í fyrstu umførini. Í Miðvági vóru teir sannførandi, og teir vístu aftur sunnudagin, at tað skal roknast við teimum. Ikki minst eftir at Jens Kristian Hansen er komin fyri seg, er spælið farið at hanga betri saman, og tað hevur eisini lyft aðrar lyklaspælarar – eitt nú Jákup á Borg – til tað, sum teir áður hava víst. Í løtuni er stóri spurningurin, hvat ella um B36 fer at megna at gera nakað við HB.

Í Klaksvík er skilið ikki gott. Í trimum royndum hava teir tilsaman tapt 18–3 ímóti B36!! So livandi galið hevur tað neyvan nakrantíð í einum kappingarári hilnast hjá KÍ ímóti einum og sama liði. Tað er undrunarvert og boðar ikki frá góðum, at KÍ enn eina ferð leyp so beint í felluna, sum teir fyri einum stórum mánað síðani tvassaðu í á heimavølli ímóti B36 – tað var í seinnu hálvfinaluni í steypakappingini.

Viðhvørt skal fingurin stingast í jørðina og bestikk takast av støðuni. Í steypakappingini var tað líka mikið, um tapið í seinnu hálvfinaluni var 3–0 ella 7–1. Soleiðis er tað ikki í landskappingardysti. Har telur málmunurin, og har hevur tað nógv at siga fyri sinniligu støðuna og harvið fyritreytirnar fyri avrikunum næstu vikurnar, tá ið fleiri umfør eru á skránni, at tað gongst so frægt, sum tað ber til. Aftaná avhølvingina í Gundadali er spurningurin, hví KÍ flutti tryggasta verjumannin í álopið, tá ið støðan var 2–0. Hvussu taktiska medvitið er, mugu teir gera upp við seg sjálvar. Men sunnudagurin var á ongan hátt sannførandi fyri KÍ.

Sum klaksvíkingurin helt fyri sunnukvøldið. Lagið er so vánaligt eftir havnarferðina, at vit mugu gleðast um danska meistaraskapin. Vit hava átt lut í danska meistaraskapinum í 2000, 2001 og nú aftur í 2003. Tað mugu vit fegnast um, meðan vit vóna, at tað fer at lýsna hjá KÍ. Soleiðis segði hann, og úrslitið í Gundadali ger tað ikki torført at fylgja honum.

### Kostar nógv

Hjá VB er kostnaðurin og sviðin stórur. Teir gjørdu seg út, teir vístu góðan hugburð, og teir spældu seg til nógvar møguleikar, men teir fingu einki burturúr ímóti HB. Samstundis stóðu liðini, sum teir kappast við, seg væl. EB/-Streyumur fekk eitt stig, og FS Vágar fekk trý stig. Nú er longri hjá VB upp til áttanda plássið, enn tað hevur verið í fleiri vikur.

Skála hevði frí og er framvegis stigaleyst og aftast. NSÍ hevði møguleikan at sleppa einsamalt fram á næstfremsta plássið, men teir mistu sigurin í síðstu sekundunum. At sigurin, sum er so tætt við, verður broyttur til javnleik, kostar nógv. Tað kann væl fara at vísa seg seinni í heyst, at júst tey bæði stigini, sum NSÍ misti á Eiði, fara at verða nógv saknaði.

Nú skulu føroysku feløgini spæla í Europa Cup. KÍ og NSÍ skulu til Noregs, har tað neyvan er væntandi, at tað fer at ganga so nógv øðrvísi, enn tað plagar. Oddaliðið, HB, skal til Letlands. Um nakar skal standa seg væl í Europa Cup, so skal tað – út frá avrikunum higartil í landskappingini – vera oddaliðið.

GÍ var leygardagin á útivølli í Intertoto Cup. Tað fekk, sum tað plagar at gera í altjóða avbjóðingunum. GÍ megnaði eina løtu út í 2. hálvleik bara at vera aftanfyri 2–1, men so fekk mótstøðuliðið tvey mál afturat, og tað hevur við sær, at talan bara verður um avgreiðsluspurning, tá ið teir leygardagin fara at spæla í Føroyum. Í hvussu so er, tá ið talan er um, hvat av liðunum skal spæla í næsta umfarinum.